VIÐMERKINGAR

# Fá tær eitt kalt brúsubað, Virgar!

SJÚRÐUR SKAALE



**Góði Virgar Dalsgaard! Tað var ein herlig ramsa, tú hevði um meg í bløðunum í gjár**

Surrealistiskt sannleiksvitni. Søgubronglari. Virtuellur realistur. Bandittur. Amatøragentur. Naivur idiotur. Perfidur. Luskutur. Illoyalur. Ófólkaligur. Infantilur skølingur, sum átti at verið permanent útihýstur úr bæði politikki og embætisliði.

Og so tað besta: Ússaligur korruptur amatørur, andaliga nær skyldur við og líka so kemiskt fríur fyri moral, skammarkenslu og anstendigheit sum blikksmiðjubandin í Watergatemálinum, subtilir stórnjósnarar hjá KGB og kommunistiski stasi-bandin!

Góði Virgar! Tað er altíð hugtakandi at lesa tað, tú skrivar. Tú ert bæði ein heilt sjáldsama góður stílistur og ein framúr analytikari. Og skemtiligur afturat. Ikki minst í gjár. Sum heild ein sannur fongur fyri tann flokkin, tú hevur stuðlað so treytaleyst í so mong ár.

Men viðhvørt átti tú kortini – mest fyri tína egnu skyld – at fingið tær eitt kalt brúsubað, áðrenn tú setist við knappaborðið...

*sjurdurskaale@gmail.com*

# Tað ið Hvalvíkarprestur skuldi havt gjørt

DÁVID Í LÁG



**Tað ið Mogens Tilsted Christensen skuldi havt gjørt, var at skriva lesarabrævið, hann hevði í blaðinum 23.des., sum ein sang, heldur Dávid í Lág**

So hevði hann nokk ikki blivið meldaður av trimum havnarockarum. Hetta skuldu teir vitað, tí teir blíva sjálvir ongantíð meldaðir fyri nakað, sum teir hava sagt ella skrivað. Kunsturin er, at bara tað verður skrivað í einum sangi, og sungið saman við einum lagi, so verður man ikki meldaður til politiið. Tað mundu vera tey flestu sum smíltust og ristu við høvdinum, tá tey hoyrdu, hvør hevði meldað prestin í Hvalvík... »Og tað skulu teir siga!!«

Eg havi valt, at hendan greinin er ein sangur, ið eg skrivi. Finn sjálv/ur eitt lag til, so kann ongin melda meg, tað er ongin ivi!

Tá ið so ein prestur skrivar eina grein, har hann rósar løgtinginum fyri at siga nei til at broyta revsulógina, og einastanist í grein síni sigur, at eftir hansara fatan skuldu hvørki samkynd ella pedofilar sloppið at verið lærarar í fólkaskúlanum ella arbeiða á dagstovnum, ja so verður hann meldaður. Meldaður fyri hvat? Fyri at siga sína hugsan?

Sjálvur takið eg fult undir við tí, sum Mogens Tilsted Christensen skrivaði 23. desember. Eg haldi heldur ikki, at samkynd ella pedofil skulu sleppa at undirvísa í fólkaskúlanum. Eg meini, at samkynd ikki skulu sleppa at undirvísa eitt nú í kristni, tí hetta er eftir mínari meting 200% mótsigandi og heilt burturvið. Eg kundi hugsað mær at spurt:

Vildu vit givið einum muslimi loyvi at undirvíst í kristni í tí føroyska fólkaskúlanum? Eg rokni ikki við tí, tí úr hesum hevði nokk ikki nakað gott komið burtur úr. Men so høvdu vit diskriminerað viðkomandi muslim! Og tað er ólóligt sambært revsulógini. Man skal bara brúka peruna eitt sindur fyri at taka tí røttu avgerðina.

Eg havi hoyrt um dømi, har lærarar, ið koma frá brøðrasamkomuni, ikki sleppa at undirvísa í kristni í tí føroyska fólkaskúlanum, og kann hetta als ikki góðtakast. Hetta eru jú trúgvandi/kristin fólk. Skulu vit so ikki eisini hava eina grundlógarbroyting, sum verjir brøðrasamkomuna? Og sum eg havi skrivað fyrr, so haldi eg als ikki, at tað er so synd í teimum samkyndu. Tey hava tað eins gott, sum vit sum ikki kalla okkum samkynd. Hvat so um tað falla nøkur orð, so munu tey fleystu nokk uppliva!

Eg ynski at takka teimum løgtingsmonnum, sum stemmaðu ímóti hesum lógaruppskoti at broyta revsulógina. Hetta vísur bert, at Føroya fólk hevur sagt nei til eina slíka lógarbroyting. Og til endans eina tøkk til Mogens Tilsted Christensen fyri eina avbera góða grein.

*david@godvs.net*

# Føroya fólk hevur avgerðarrættin

KÁRI P. HØJGAARD
Løgtingslimur
Sjálvstýrisfloksins



**– Altavgerandi er, at vit finna ein breiðan meirluta í Føroyum fyri stigum, ið takast skulu á sjálvstýrisleið, heldur Kári P. Højgaard**

Seinastu dagarnar hava fjølmiðlarnir dagliga hýst orðadrátti millum løgmann og formann Tjóðveldisfloksins Høgna Hoydal. Ein skuldi trúð, at tá menn skrivliga í fjølmiðlunum og munnliga í loftmiðlunum fingu so góða tíð at greiða frá sjónarmiðum sínum vóru fá ivamál eftir; men so var ikki. Neyvan gjørdist nakar klókari av tjakinum, og heldur ikki íslendski ella tann danski serfrøðingurin í fimmaranum loystu gátuna, um fráboðanin til ST var eitt framstig, status Quo, ella eitt afturstig.

Longu tá Uttanríkispolitiska heimildarlógin var til viðgerðar í Løgtinginum vísti løgfrøðisliga ráðgevingin hjá tinginum á, at ongin meining var í at samtykkja tvær lógir, har serstakar viðmerkingar vóru í danska lógaruppskotinum, ið ikki vóru við í tí føroyska. Hetta hevur eftirfylgjandi verið trupulleikin og er tað sera óheppið, at vit ikki kundu finna eina felags loysn millum samgongu og andstøðu í hesum máli.

Eg fegnaðist um at lesa greinina hjá Halgir Winther Poulsen, løgfrøðingi við yvirskriftini »Eidesgaard og Hoydal fara skeivir«. Her kemur løgfrøðingurin til niðurstøðuna, at málið er blást upp, og at fráboðanin til ST ikki hevur tann týdning, sum løgmaður og Høgni Hoydal gera hana til.

Tað er týdningarmikið at fasthalda, at føroyingar lúka øll krøv sambært altjóða rætti til at verða viðurkendir sum serstøk tjóð og eiga sostatt sjálvsavgerðarrætt.

Altavgerandi er, at vit finna breiðan meiriluta herheima fyri stigum, ið takast skulu á sjálvstýrisleið. Skulu sømdir vinnast uttan fyri landoddarnar er neyðugt, at vit standa saman. Hetta gerst ikki við at leggja seg skerflatan fyri dønum; eiheldur gagnar slagorðið loysing, helst í gjár.

Hvussu føroyingar ynskja at skipa samfelagið, eigur at koma fram í nýggju grund/stjórnarskipanarlógini. Her mugu vit koma til eina felags semju við støði í samfelagsstøðuni ídag, og hvussu vit gera, tá ríkisrættarliga støðan broytist.

Ein fyri Føroyar spennandi og týdningarmikil avgerð fellur helst á Norðurlandaráðsfundinum í Keypmannahavn seinni í ár. Tá kemur støðutakanin til føroysku umsóknina um sjálvstøðugan føroyskan limaskap í Norðurlandaráðnum væntandi til endaliga viðgerð.

*kph@post.olivant.fo*

# Eitt sekund aftrat

MALMBERG D. OLSEN



**– Vit liva í eini tíð, har alt skal ganga við rúkandi ferð, alt skal ganga so skjótt. Men spurningurin er so bara, um vit fáa meira tíð til næsta okkara, sum er tað vesentliga við lívinum, hugleiðir Malmberg D. Olsen**

So fóru vit um nýggjársgott við einum áhaldandi lágættarvindi og dimmveðri, nú farið er um trettanda dag, og alt jólaprýðið hvørvur úr gluggunum og gerandisdagurin er ein veruleiki aftur.

Framman fyri okkum liggja 365 dagar plus eitt sekund. Um hvør einstakur av okkum eigur allar 365 dagarnar er fjalt fyri eygum okkara. Eitt vanligt mannalív sigst at verða 25.550 dagar. Hesar sannleikar hevur Símin av Skarði avmyndað fyrimyndarliga í einum av vøkru sálmun sínum »Tann Gud sum valdar ævum øllum«, har hann í 5. versi sigur:

*Hvat nýggja árið vil mær veita,*
*Tað fjalt og dult er fyri mær.*
*Men, Guð mín, eg vil á teg heita*
*Og biðja eina bøn av tær:*
*Lat verk mítt lítið ella stórt*
*Til tína æru verða gjørt.*

Mær tykir at hettar er ein megnar áminning at hava við sær inn í tað ókenda tíðarinnar hav, har mangan er illa sjógvað og nógvar ýðir eru uppi á leiðini, sum vit við egnari hjálp ikki eru før fyri at koma ígjøgnum.

Gud hevur ongantíð lovað at leitt okkum uttan um tær sváru hendingarnar, men hann hevur lovað at leitt okkum ígjøgnum tær, og tað fer hann eisini at gera í komandi døgum.

Tíðin er dýrabar, men so fingu vit eitt sekund aftrat sigst, men tað fer tann einstaki neyvan at merkja nakað til, men tað skerst ikki burtur, at tað var mangan í síðsta sekundi, at bólturin bleiv sendur í netið, og sigurin var veruleiki, ella teir lógu stavn um stavn inn móti málinum, men tað var í síðsta sekundi, ein bleiv stavnin framman fyri og vann róðurin, ella tað var tann neyðstaddi sum bleiv bjargaður í síðsta sekundi. Soleiðis er so nógv vit kundu nevnt úr lívsins harða leiki har sekundið gjørdi munin.

Vit liva í eini tíð, har alt skal ganga við rúkandi ferð, breiðbands fepurin er yvir landi okkara, ein farin tíð at sita og bíða framman fyri telduni í nakrar minuttir. Tað skal verða í einum sekundi, tú ært forbindilsi út í heim.

Spurningurin er so bara: Fekst tú so meira tíð til tín næsta, sum er tað vesentliga við lívið okkara?

Hagtøl vísa, at ongantíð hava verið so nógvar skilsmissur, sum í 2005. Hettar er ein sorgarleikur fyri land okkara í allari vælferðini sum sigst at vera. Helst eru tað nógv ólukkulig børn aftan fyri tær vøkru fasadurnar, og ágangurin ímóti tí normala hjúnarlagnum harðnar, so tað sum er ónormalt skal gerast normalt.

Hvat hevur so tað nýggja árið at bjóða tí einstaka? Treysti og áræði skal til, um ein skal vinna fram á leiðini. Allar fiskivinnusamráðingarnar tykjast at vera komnar uppá pláss, okkara fiskifloti hevur somu møguleikar, sum undanfarin ár at veiða fisk av grunni, og eitt av teim heilt stóru arbeiðsplássunum við 100 fólkum umborð veiðir svartkjaft, sum verður viðgjørdur umborð. Vit hoyra, at útlitini eru góð fyri árinum, sum vit eru komin inní.

Bankar og sparikassar geva út av trumluni fyri at nótin kann søkka djúpt, so møguleikarnir fyri at fáa meir í gerast nógv betur, og tað skal tann einstaki kundin veruliga merkja í húsarhaldinum verður sagt.

Og íslendingar hava boðað frá, at teir ætla sær bankavirsemi her á landi, so sigast má, at møguleikar fyri framburði eru í eygsjón.

Og tó nýggjársbálið er ikki meir enn sløknað, tá ein fráboðan til ST setur alt í brand – ein fráboðan, sum sigur at mitt í Atlantshavinum býr eitt fólk, sum hevur búleikast á hesum oyggjum í øldir, sum eita føroyingar.

J. Patursson yrkir í sanginum »Boðar tú til allar tjóðir« í vers 2: »Føroya mál á manna tungu merkir: Her býr Føroya fólk«.

Ein serfrøðingur fyri og annar eftir trína inn á vøllin við sínum metingum, summir við gula kortinum og aðrir við tí reyða, siga sína hugsan um hesa fráboðan og framtíð okkara sum tjóð.

Tað verður neyvan henda fráboðan, sum kemur at merkja gerandisdagin hjá føroyingum, men treysti og áræði eins og í undanfarnu tíðum.

Eitt sekund aftrat, vit kunna gleðast um hvørt sekund dagurin leingist fram yvir og myrkrið má umsíðir dvína fyri ljósinum, og tað er júst boðskapurin, sum jólahátíðin bar okkum við frelsarans føðing.

Veður og vindur má sær ráða, men tað ber mót ljósari tíðum, sjálvt um tað í skrivandi løtu tykist, sum myrkrið berjist í móti ljósinum, sum tó umsíðir fer at sigra. Sólin kemur so við og við hægri upp á luftina og fer sum frá líður at kalla alt lív fram, sum hevur ligið í dvala ta myrku tíðina av árinum.

Hetta er ein føst skipan frá skaparans hond ár eftir ár, her skulu ongar samráðingar til. Guð segði: Og tað bleiv so.

Við ynski um eitt gott nýggjár.